# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

B36-HB 0-0:

# Nullloysn í Gundadali

**Hóast HB spældi við einum manni fleiri í ein hálvan tíma, so megnaðu teir reyðu og svørtu ikki at fáa umráðandi útivallarmálið í fyrru hálvfinaluni í kappingini um løgmanssteypið. Í dýrdarveðrinum í Gundadali í gjár leiktu HB og B36 málleysan javnleik**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*HB var fyri tað nógva liðið, sum søkti móti mótstøðumálinum. Men tað eydnaðist ongan tíð at fáa hol á, og so stendur alt opið undan seinnu hálvfinaluni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann var so nær dreymalandinum. Poul Thomas Dam úr HB harmast helst stórliga um, at frálíka langskot hansara í seinasta minuttinum í grannauppgerðini í gjár ikki fór í netið. Úr 25 metra fjarstøðu smekkaði verjuleikarin til, men tvørtræið var fyri honum.

HB megnaði ikki at gera sær dælt av støðuni, tá Klæmint Matras var útvístur. Við einum leikara fleiri í ein hálvan tíma endaði tað við eini nullloysn í Gundadali, tá grannarnir hittust í seinnu hálvfinaluni um løgmanssteypið. Bestu roydina átti Poul Thomas Dam, men hepnið var ikki við teimum reyðu og svørtu.

## HB við yvirlutan

Ein broyting var í byrjunaruppstillingini hjá HB frá vikuskiftinum. Ólavur Sakarisson í Ólavsstovu loysti Milan Kuljic av á miðvøllinum frá seinast, og hann kom væl frá uppgávuni. Hann megnaði leiklutin sum skapandi miðvallari. Á veinginum ræddust Jákup á Borg og Hendrik Rubeksen ikki at bjóða av, og fleiri ferðir sendu teir inn frá síðunum. Í feltinum vóru framherjarnir ov lítið grammir, og lítið spurdist burtur úr mongu innleggunum.

Fyrsti veruligi møguleikin fall til B36. Károly Potenkim slapp leysur í vinstru og sendi inn til Alex José Dos Santos. Hóast brasiliumaðurin hevði væl av plássi, so sendi hann beint á málverjan. Marcin Dawid noyddist í seinastu minuttunum av dystinum lata seg útskifta, eftir samanbrest við Patrick Sunday. Tað var einasta vandamikla atsóknin hjá árstalsfelagnum undan steðginum.

HB var nógv meira á bóltinum í fyrra hálvleiki, men sjáldan var Meinhardt Joensen settur undir veruligt trýst.

## Tvørtræið bjargaði

B36 var væl betri við eftir hvíldina. Sum einsamallur framherji megnaði Károly Potemkin at seta miðverjarnar hjá HB í ivastøður. Hann var miðskeiðis í seinna hálvleiki útskiftur við Patrick Sunday Okoro, sum leikti sín fyrsta dyst fyri árstalsfelagið. Hann prógvaði sera lítið ta løtuna, hann var á vøllinum. 21 ára gamli nigerianin tóktist hava torført við finna sær pláss, og í luftspælinum vann hann fáar nærdystir.

Teir reyðu og svørtu áttu fyrstu royndina í seinna umfarinum, tá Hendrik Rubeksen við høvdinum stýrdi innleggi frá Jákupi á Borg beint framvið málinum.

Spurnartekin kann setast við summar av avgerðunum hjá Páll Augustinussen, dómara, í gjár. Torført var hinvegin at mótmæla, tá liðskiparin og stríðsmaðurin hjá B36, Klæmint Matras, var útvístur. Tvær ferðir fekk hann gult kort, og so noyddust hvítu havnarmenninir at spæla seinasta hálva tíman við 10 monnum.

Heðin Askham og hansara leikarar tóktust ikki ávirkaðir av støðuni, og teir vóru munandi meira ágangandi í sínum spæli. Mótstøðumenninir vóru tó ikki altíð væl ansaðir, og serliga burdi Christian Høgni Jacobsen, sum aftur í gjár misnýtti fleiri upplagdar møguleikar.

Við málleysa javnleikinum hevur B36 betri útgangsstøði til seinnu hálvfinaluna. Eitt mál kann fáa stóran týdning, meðan teir reyðu og svørtu skulu enda omaná.

## FAKTA

**B36 – HB 0-0 (0-0)**
**Dómari:** Páll Augustinussen
**B36:** Meinhardt Joensen – Magnus Olsen, Herbert í Lon Jacobsen, Dimitrije Jankovic, Alex José Dos Santos – Róaldur Jacobsen (Svenn F. Jacobsen, 64.), Klæmint Matras, Nagy Tamás – Hanus Thorleifsson, Károly Potemkin (Patrick Sunday Okoro, 73.), Bergur Midjord (Johan Ellingsgaard, 80.)
**Gult kort:** Klæmint Matras (2)
**Reytt kort:** Klæmint Matras, tvey gul
**HB:** Marcin Dawid (Tróndur Vatnhamar, 90.) – Mortan úr Hørg (Pætur Jørgensen, 71.), Hans á Lag, Fróði Benjaminsen, Poul Thomas Dam – Jákup á Borg, Kári Nielsen, Ólavur S. í Ólavsstovu (Milan Kuljic, 66.), Hendrik Rubeksen – Andrew av Fløtum, Christian Høgni Jacobsen
**Gult kort:** Ólavur í Ólavsstovu, Jákup á Borg, Christian Høgni Jacobsen